*–~Eg eri skelkaður av álopinum, sum eftir øllum at døma var tilætlað*

*(Kofi Annan)*

SAMBAND
ÆRNI JOENSEN
XXXXXX@SOSIALURIN.FO
TLF 3418XX

# ÚTLOND



*Hjálparfelagsskapir halda, at Ísrael fer alt ov harðliga fram í Libanon*

# Ísrael bumbaði ST-støð í Libanon

**Ísraelska stjórnin hevur biðið ST um umbering, men Kofi Annan, aðalskrivari, er í øðini um álopið**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

ST-støðin, sum varð rakt, er í Khiam-økinum tætt við markið millum Ísrael og Libanon. Sambært teimum fyrstu frágreiðingunum vóru fýra eygleiðarar úr Finnlandi, Eysturríki, Kanada og Kina inni, tá ísraelsk flogfør skutu rakettir eftir støðini. Álopið var so ógvusligt, at allur bygningurin rapaði.

Talsmaðurin hjá ST-eygleiðarunum í Libanon, Milos Strugar, segði í morgun, at ísraelsmenn hildu á at skjóta eftir teimum rapaðu húsatoftunum, og tí var ikki hugsingur um hjá bjargingarliðunum at leita eftir teimum fýra eygleiðarunum.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, var í øðini, tá hann frætti tíðindini um álopið.

– Eg eri skelkaður og sera harmur um álopið, sum eftir øllum at døma var tilætlað, sjálvt um Ehud Olmert, forsætisráðharri, hevur vissað meg um, at Ísrael fór ikki at søkja at ST-støðunum, segði Kofi Annan í nátt.

Tað heldur óvanliga orðalagið hjá tí annars so siðiliga aðalskrivaranum fekk ísraelska ST-sendiharran, Dan Gillerman, at svara, at eftir hansara tykki var aðalskrivarin lopin framav. Seinni kunngjørdi ísraelska stjórnin, at Ehud Olmert, forsætisráðharri, hevði ringt til Kofi Annan og biðið um umbering fyri álopið, men at hann eisini hevði sagt seg harmast um, at aðalskrivarin hevði lagt ísraelsku flogførini undir at hava bumbað ST-støðina við vilja.

Ísraelska stjórnin segði í morgun, at tilburðurin í gjár skal kannast til botns.

– Vit hava ongar ætlanir um at raka starvsfólk hjá ST, og vit hava alla tíðina lagt okkum eftir at sleppa undan mistøkum sum hesum. Hesin syrgiligi tilburðurin verður kannaður væl og virðiliga, segði talsmaðurin hjá ísraelska uttanríkisráðnum, Mark Regev.

Eygleiðarar siga, at ísraelska álopið á ST-støðina fær uttan iva ávirkan á ráðstevnuna um Miðeystur, sum byrjar í Rom í dag. Teir siga seg eisini bera ótta fyri, at tilburðurin fer at gera tað uppaftur torførari at finna eina semju um vápnahvíld.

### Finnast at Ísrael

Fleiri hjálparfelagsskapir finnast tú at ísraelsku krígsførsluni í Libanon. Hans Marten Haugen hjá norsku Kirkjuneyðhjálpini sigur við NTB, at tað ísraelska hervaldið er eirindaleyst, og at tann stóra valdsnýtslan kann ikki elva til annað enn hatur.

Hann ivast ikki í, at Hizbollah er líka eirindaleyst sum Ísrael, men vísir tó á, at Hizbollah hevur ikki jagaraflogfør, stríðstyrlur, herskip og stríðsvognar.

Knut Kaspersen, sum starvast á altjóða deildini hjá Reyða Krossi og Reyða Hálvmána í Libanon, sigur við NTB, at ísraelska flogvápnið hevur søkt at sjúkrahúsum og sjúkrabilum. Eitt nú søktu flogfør at einari hjálparstøð í gjár. Støðin er beint við eitt sjúkrahús, og einki hernaðarligt mál er nær námind sjúkrahúsinum, sigur Knut Kaspersen.

Hann vísir á, at sambært Geneve-sáttmálanum hevur Ísrael skyldu til at verja støðir og starvsfólk hjá Reyða Krossi og sjúk og særd, sum felagsskapurin hevur um hendi.

**STUTT SAGT**

## Stúra fyri morðroynd

Løgreglan í Kolombia ber ótta fyri, at onkur fer at royna at beina fyri landsins forseta, Alvaro Uribe, áðrenn hann skal takast í eið tann 7. august.

Tað seinasta samdøgrið hevur løgreglan funnið 200 kilo av spreingievni tætt uttan fyri høvuðsstaðin Bogota, og tveir mans eru handtiknir. Gusto Matamoros, talsmaður hjá herinum, sigur við AP, at fólk, sum hava so nógv spreingievni, kunnu ikki hava aðrar ætlanir enn at brúka tað til yvirgang. Løgreglan hevur leingi havt illgruna um, at ein uppreistrarfelagsskapur hevur lagt ætlanir um at myrða Alvaro Uribe, men tað er ikki greitt, um teir báðir tiknu menninir eru limir í felagsskapinum.

Alvaro Uribe varð afturvaldur á forsetavalinum herfyri, og myndugleikarnir hava sett sær fyri at forða fyri, at tað, sum hendi, tá hann varð valdur fyrru ferð í 2002, skal endurtaka seg nú. Tá royndi tann vinstrasinnaði FARC-uppreistrarherurin at søkja at forsetaborgini, og 21 fólk lótu lív.

## Norsk Hydro ger kvetti



Tann góði oljuprísurin kemur sum vera man oljufeløgunum væl við, og tað sást eisini í roknskapinum hjá Norsk Hydro fyri annan ársfjórðing í ár, sum felagið kunngjørdi í gjár.

Roknskapurin vísir, at felagið hevði góðar fimm milliardir krónur í avlopi í apríl-ársfjórðingi, og tað er heili 51 prosent meiri enn í sama ársfjórðingi í fjør, tá avlopið var 3,4 milliardir krónur. Framgongdin stendst bara av príshækkingini, tí Norsk Hydro hevur vunnið minni olju í Norðsjónum í apríl-ársfjórðingi í ár enn í fjør.

Sambært AFP var meðaloljuprísurin 67,9 dollarar í apríl-ársfjórðingi í ár ella 36 prosent hægri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Í seinastuni hevur kreppan í Miðeystri gjørt, at prísurin hevur verið heilt uppi á 78 dollarum fyri tunnuna.

## Kunngera naziskjøl

Týska stjórnin hevur í dag skrivað undir eina avtalu, sum gevur fólki atgongd til fleiri milliónir skjøl frá nazi-tíðini. Tað eru tó í fyrsta lagi granskarar, sum fáa atgongd til skjølini.

Higartil hava bara offur fyri jødatýningini hjá nazistunum havt atgongd til skjølini, og týsku myndugleikarnir hava leingi hildið uppá, at teir kundu ikki lata onnur sleppa at hyggja í tey, tí tað hevði verið í stríð við landsins lógir um persónsverju. Men eftir áhaldandi trýst hevur Týskland játtað at lata skjalagoymslurnar upp. Tað eru serliga eftirkomarar hjá offrum frá nazi-tíðini, sum hava lagt trýst á Týskland, tí tey halda uppá, at tey hava rætt til at fáa at vita, hvat hendi teirra forfedrum.

Ellivu lond hava verið uppi í samráðingunum um tey loyniligu skjølini, og sambært avtaluni skulu øll londini staðfesta semjuna, áðrenn hon kemur í gildi.